

# Fekk norðurlendska



HEIÐUR: Bogi Hansen, havfrøðingur og granskari á Fiskirannsóknarstovuni fekk Náttúru- og Umhvørvisvirðislønina hjá Norðurlandaráðnum fyri 2006.



**EILIF GAARD, LÍVFRØÐINGUR**

Bogi Hansen fekk virðislønina fyri sína gransking í havfrøði og veðurlagi í Norðurhøvum. Serliga er tað gransking hansara í havstreymum og tí týdningi hesir havstreymar hava fyri veðurlagið í Norðurhøvum, sum hevur vakt ans. Eisini legði dómsnevndin dent á, at hann á lættan og livandi hátt dugir at kunna almenning, politikarar og granskarar um veðurlag og havfrøði.

Dómsnevndin metir Boga Hansen vera eitt gott umboð fyri norðurlendska gransking, sum hevur havt stóran altjóða týdning.

Tann lýggi sjógvurin, ið rekur av útsynningi fram við Føroyum og norður í Norskahavið, er orsøkin til tað lýggja veðurlagið í Norðurlondum. Skulu vit kunna siga nakað um møguligar veðurlagsbroytingar, er tað ein fyritreyt, at vit hava neyva vitan um hettar havrák.

Bogi Hansen hevur sett í verk stóra kanning av hesum ráki. Úrslitini hava stóran týdning fyri veðurlagsgransking í Norðurhøvum.

Granskingin hjá Boga fevnir víða. Umframt umfatandi havfrøðiliga gransking av føroyskum sjógvi, hevur hann eisini granskað hvørja ávirkan havfrøðin hevur á vistfrøðina og lívfrøðiliga framleiðslu á Landgrunninum og føroysku havleiðunum annars.

Bogi hevur luttikið í nógvum norðurlendskum og altjóða granskingarverkætlanum, og í løtuni er hann m.a. formaður fyri Vestnordisk Oceanklimaforskning. Eisini hevur hann skrivað hópin av greinum í høgt mettum altjóða vísindatíðarritum.

*Sama dag sum tað varð kunngjørt, at virðislønin hjá Norðurlandaráðnum skuldi latast Boga Hansen, varð hann útnevndur professari á Fróðskaparsetri Føroya. Her handar Jóan Pauli Joensen, rektari á Fróðskaparsetrinum, Boga prógv um professaratilnevningina. Umhvørvisvirðislønina fekk Bogi Hansen handaða í Keypmannahavn tann 1. november 2006.*

# umhvørvisvirðisløn



